

ÚF

Pallborð sett yvir besta kvøldið. Haukur, røktarheim og Fríu (popp) Føroyar

Tá tú arbeiðir sum journalistur, kanst tú iki vænta at hava frí øll kvøld.

Verri enn so.

Hvørki mikukvøldið ella hóskvøldið hoyrdi eg Útvarpið.

Ja, mikukvøldið fekk eg nakað av Sonna og Hauki Morthens við.

Eg veit ikki, um man skal kalla tað fusk ella sjarmu, tá Sonne síðst í sendingini rættar tað, hann hevur sagt fyrst í henni.

Í lættari sending sum hesari ger tað onki. Bara tað ikki breiðir seg til tær seriøsu sendingarnar.

Hóskvøldið var eftir skránni pallborðsfundurin um fólkaskúlan, sum Lærarafelagið skipaði fyri síðsta leygarag.

Tað er í lagi at senda slíkan fund. Men eg haldi ikki, tað er í lagi, at lata skránna eitt heilt kvøld víkja.

Serliga, tá tað er hóskvøld. Tí hóskvøld er tað besta, viðhvørt næstbesta, hjá Útvarpinum.

Pallborðsfundir áttu at verið sendir seinnapart leygarag.

Ella eftir tíðindini kl. 21,00 okkurt gerandiskvøld.

Ella býta hann millum tvey kvøld.

Sita heima

Eg havi hug at nevna nakað, ein annar útvarpslurtari vísti mær á nú ein dagin.

Í Runavík var røktarheim vígt fyrst í februar. Av náttúrligum grundum kundu nógv teirra, hetta heimið er bygt til, ikki koma til vígsluna, sigur hesin lurtarin. Tey vóru ikki før fyri tí.

Hesi fólk væntaðu at hoyra frá vígsluni í Útvarpinum. Men har kom onki.

— Eg havi fingið at vita, at Útvarpið var boðið við til vígsluna. Men ongin kom, sigur hesin ónøgdi lurtarin.

Og so fari eg at takka tí, sum skrivar um popp í Fríum Føroyum, at viðkomandi lesur væl hendan teigin hjá mær.

Í samrøðu við Teinar brúkar hann allar teir spurningar, eg setti sum dømi, tá eg viðgjørdi fyrstu Ungdómssendingina.

Hetta er nakað nýtt. Higartil hava vit blaðfólk hildið okkum til bert at stjala myndir hvør frá øðrum.

Men, sum ein góður útvarpsmaður plagar at taka til:

— Hatta skilur okkum ikki!

Høgni Djurhuus

Ú. F.

Leygardagur 25.

09,30 **Vikanið fer**
10,00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
10,05 **Fyrrapartsløg**
11,00 **Tíðindi**
11,01 **Framhaldssøgan »Malan«** — 29. partur
11,30 **Undir døgurða**
13,01 **Barnaútvarpið**
13,40 **Framhaldssøgan »Malan«** — 30. partur
19,00 **V4-dráttur**
19,05 **Hvat er dukkuleikur?**
Sonne Smith vitjar á skeiði, sum verður hildið í Norðurlandahúsinum um dukkusjónleik
19,40 **Leygarkvøldsløg**
Árni Gregersen leggur til rættis
20,05 **Dagsins poppur**
Leif Láadal skipar fyri
20,55 **Hetta heilaga evangeliið skrivar**
n Weihe prestur lesur

Sunnudagur 26.

14,00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
14,10 **Vælkomin veri tú friski vindur**
Sending við føroyskum sangum
14,30 **Útvarpsleikurin »Lin Pe og tami trani hansara«** eftir William Heinesen. D.J. Jørgensen týddi. Oskar Hermansson leggur til rættis
15,15 **Kvøðuljómar**
16,30 **Ljómandi ferðafrásøgn**
Úr bókini »ferð mín til Jorsala« eftir K. O. Viderø. Axel Tórgarð leggur til rættis
17,00 **Guðstænasta úr Oyndarfjarðar kirkju**
Petur Petersen prestur prædikar
18,00 **Tónleikur**
18,30 **Veðurtíðindi og tíðindi**
18,40 **Ítróttatíðindi**
18,50 **Vit fara upp á gólv**
Der hersked en konge i Østerdal. Dansur í Sumba. Bjarni Vestergaard skipar.
Det er i nat en vågenat. Dansifelagið í Havn. Hilmar Kass skipar.
Der gaard dans paa Ribergade. Klaksvíkar Dansifelag. Johan Petersen (skard) skipar.
Vaagen. Dansifelagið í Havn. Poul Eide skipar
19.45 **Tíðindi á grønlendskum**

Mánadagur 27.

09,30 **Sjónarringurin**
10,00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
10,05 **Fyrrapartsløg**
Sjúrður Horsdal
11,00 **Tíðindi**
11,01 **Hvat er dukkuleikur?**
11,30 **Undir døgurða**
19,00 **Framhaldssøgan »Malan«** — 31. partur — eftir Eilif Mortansson. Hans Thomsen lesur og týður
19,30 **Rockredaksjónin**
Jákup Magnussen leggur til rættis
20,10 **Fiskimarknaðir**
Fyrilestur eftir Birgir Danielsen í røðini um føroyska søgu
20,40 **Aktuelt uttaneftir**

D. R.

Leygardagur 25.

06,00 **Radioavis**
07,00 **Radioavis**
07,45 **Udefra**
Orientering om verden, mennesker og meninger
08,00 **Radioavis**
08,25 **Kvinder**
Ruth — jeg var alkoholiker i 35 år.
Den tredje af fire udsendelser
08,40 **Jeg er ikke kun en krop**
Om børn på hospitaler, hvor det ikke kun handler om fysisk helbredelse
10,00 **»Det bitterste jeg har oplevet«**
En livshistorie — eller historien om den urimelige start, som en mand fik i livet — fra den ene institution til den anden
10,50 **Trafikdebatten**
Et ugentligt program om trafikpolitik og samfærdsel
11,02 **Radioavis**
11,20 **Job, erhverv, penge**
(Sendes også kl. 17,30 P1)
12,00 **Samklang**
En musisk mosaik — samlet og redigeret af Knus Wissum
12,30 **Hvad er min ret og hvad er min pligt?**
Social brevkasse
14,30 **Oehlenschlæger i rutchebanen**
En skinger og munter nutid indpodet guldrandet romantik
15,15 **Noget om en hest...**
En humoreske af Anton Tjekhov
17,50 **Styr på Danmarks Radio**
— hvem har det og hvordan?
18,00 **Samtale i Luthers auditorium**
Kaj Erik Lindqvist og dr. theol. Steffen Kjeldgaard-Pedersen besøger klostret i Wittenberg, hvor studenter fra hele Europa flokkedes, og hvor den lutherske teologi blev til
19,00 **Samtale i Luthers auditorium**
19,30 **Blandt unge i Tarm**
En beskrivelse af ungdommens tidsforbrug mellem skoletid og sengetid.
Gennem en række samtaler med jævnaldrende giver nogle unge fra Tarm eksempler på, hvad nutidens unge beskæftiger sig med
20,00 **Flash**
— et program om billeder
Berlin aktuel kunstby
22,00 **Radioavis**

Sunnudagur 26.

07,00 **Radioavis**
07,30 **Ud i det fri**
Et ørredskæl fortæller om hele livet
08,00 **Radioavis**
08,55 **Højmessen**
i Vester Hassing Kirke
11,25 **NYT NYt Nyt nyt**
Fra Tønder til Tórshavn - fra Nexø til Nuuk - kultur og kulturpolitik
11,50 **Clinch**
Et radiomagasin om sport og samfund
12,25 **Gregory-Mysteriet**
Kriminalføljeton i 10 dele af Francis Durbridge
13,00 **Ingen fremtid**
Montage om den russiske digter Vladimir Majakovskij
13,30 **Lexicon**
Et naturvidenskabeligt spørgeprogram
14,00 **Weekendkoncert med Barbara Hendricks**
16,00 **Hvad er da et menneske?**
Et program med tekster og samtale om os selv og det vi tror på.
Idag er temaet:
Blip-båt og Gud hvor går det godt...
17,30 **Radioavis**
17,50 **Lovorientering**
Vigtige lovvedtagelser og deres konsekvenser
20,45 **Balladen om Janne og Valde**
21,30 **Handicapmagasinet**
22,00 **Radioavis**

heldur tú ikki **sosialin**

helt at hetta mundi fara at eydnast, fór hann úr Suðuroy um Ólavsøku tíð 1655, við konu og sjey børnum, og tí mesta av góðsi sínum, á veg til Havnar, hagani hann ætlaði sær við einum av handilsskipunum. Sjálvur sat hann til róðurs á stóra sexæringinum, og kom væl fram til Skálavíkar, har ein annar bátur úr Hvalbæ lá fyri. Menn søgdu honum, at fjørðurin var óføur, og bóðu hann ikki fara, sum líkindini vóru, men hann svaraði, at hansara stóri bátur mundi væl koma fram, um minni bátar máttu verða liggjand. Tá ið hann skuldi fara úr Skálavík, vildi ein av bátsmonnunum, húskallur hjá presti, ikki fara við. Hetta gjørdist prestur so illur um, at hann slóg húskallin í andliti, so blóðið fleyt, so kappaerman hjá prestinum [illegible] kallin, Toftabóndin í Hvalbæ, ið var við hinum bátinum, fór tá í sonarins stað, tí hann segði, at hann heldur sjálvur vildi ganga burtur, enn missa sonin. Prestur fór so avstað, landnyrðingur var ættin, og øtlandi veður, so menn eygleiddu bátin norð eftir bakkanum, líka norður á Hjallan, uppi yvir Hvalnesi. Tá ið báturin var komin fyri Grynnubogan, tók ein sjógvur eina av prestadøtrunum, ið sat omaná góðsinum, uttanborðs. Prestur slapp róðrinum, fyri at bjarga dóttrini, báturin tvørskjeyts á boganum, hvølvdist, og øll umkomust.

Eitt sindur av tí, í bátinum var rak upp á Hvalnesi, og av teim 21 líkunum funnust einans prestakonan, hon rak 8 dagar eftir upp á land í Kvívík, har hon er grivin.

Tað sigst, at pengakistan hjá presti rak í Hvalbæ; tað varð tikið sum eitt tekin, um at hon goymdi fæ, ið varð vunnið við órætti.

Ein av døtrum Harra Hans Hardis, Elisabeth, var eftir í Leirum, fyri at ansa húsinum, og taka móti Harra Klæminti í Sandoy, tá hann skuldi koma at røkja kallið, og taka móti tí, ið kallið gav, til eftirmaðurin kom. Hon giftist við Niclasi Tormodsen á Toftagarði.

Ein sonur Hans Hardi var Hans Hansen, sum 1655 gekk í Havnar skula; 1658 var hann í Keypmannahavn, og var við til, millum aðrar studentar at verja býin, tá svenskararnir vóru nær við at taka hann. 1660 varð hann innskrivaður við universitetið, og tá hann varð liðugur við læruna, gjørdist hann prestur í Helsingjør. Hann doyði í 1684.

Harra Hans Hardi var norðmaður.

20.2.84
Viggo Dalsgaard